# Ineffektivitetur og Evropa

**VODAFONEDEILDIN**

## Dysturin millum B36 og ÍF segði tvær søgur. Onnur var um afturvendandi ineffektivitetin hjá B36, og hin var um ÍF, sum ikki megnar at vinna seg uppá eitt europeiskt sæti aftur

Heri Simonsen

| | |
|---|---|
| B36 | 1 |
| ÍF | 0 |

Landsliðsvenjarin, Brian Kerr var eygnavitni til dystin, og hann kundi ið hvussu er fegnast um, at Jákup Mikkelsen er væl fyri, um írin sendir boð eftir tí 40 ára gamla, roynda veteraninum til undankappingardystirnar ímóti Slovenia og Norður-Írlandi fyrst í oktober. B36 hevði eina ørgrynnu av málmøguleikum, og at tað bara eydnaðist árstalsfelagnum at skora eitt mál komst fyrst og fremst av, at Jákup Mikkelsen var so stinnur í ÍF-málinum. Tað var tó ikki bara Jákup Mikkelsen sum vardi fyri. Tríggjar ferðir vóru stengurnar við fuglfirðingum. Hjá ÍF gjørdist tapið tó ein duppultskaði. Liðið vann seg ikki upp á liðina á grannunum úr Víkingi, sum hava 40 stig á fjórða plássi. Samstundis lótu teir upp fyri møguleikanum hjá B36 at vinna seg uppá fimta plássið, sum gevur út frá, og á brotsteigarmarkinum hamraði Róaldur Jacobsen bóltin upp í nettakið aftanfyri Jákup Mikkelsen. Málið er eitt hitt vakrasta, sum er skotið í Gundadali í ár. B36 vassaði í málmøguleikum, men málið hjá Róaldi gjørdist tað einasta, sum skilti liðini.



**PERLUMÁL**

*Róaldur Jacobsen (10) skoraði eitt hitt vakrasta málið í Gundadali nakrantíð*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

### Jónas var nøgdur

Aftaná dystin var Jónas Tór Næs væl nøgdur við, at B36 nú hevur fingið sjey stig í teimum seinastu trimum dystunum. Seks stig eru upp til eitt europeiskt pláss, og tað ætla teir í B36 avgjørt at royna eftir. Andy Olsen helt ikki, at teir í ÍF vóru so niðurspældir, áðrenn B36 kom á odda, men hann ásannaði, at aftaná málið hjá Róaldi Jacobsen stóð á gomlum nøglum hjá ÍF. ÍF brennur framvegis eftir at røkka Europa, men so má annar lútur til. Seinastu fýra dystirnir hava bert givið trý stig, og Andy Olsen ásannar, at nú skulu sigrar til, um teir skulu røkka sínum máli. Fyrst á leiðini er B71 á heimavølli komandi leygardag.

*heri@sosialurin.fo*





*Róaldur Jacobsen tóktiskt eisini hava skora til 2-0, men onkursvegna metti Eiler Rasmussen hesa støðu verða fríspark til ÍF.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## *Viðmerkingar í 3. hálvleiki:*

- *Tað er ikki B36, ið skuffar, men heldur viðhaldsfólkini! Man kann ikki bara stuðla, tá tað gongur gott, skammið tykkum. B36 fjeppan.*
- *Skotteltið í Gundadali gevur bara rós til Róald(ugur.)*
- *Skipað verður fyri skotvenjing á ovara vølli, áleypararnir hjá B36 luttaka!!! Eiler løðir. Áh, teir kjansir.*
- *Tað luktar brent í Gundadali!*
- *Brennivargar, B36.*
- *Mega flott mál, Róaldur!*

## Ein útskifting í 270 minuttir

Allan Mørkøre, sum er venjari hjá B36, hevur ikki skift nógv út seinastu dystirnar. Í gjár vóru tað teir somu 11, sum byrjaðu dystin hjá árstalsfelagnum, sum endaðu dystin. Soleiðis var eisini farna sunnudag, tá B68 vitjaði í Gundadali. Mikudagin, tá B36 vitjaði á Sandi, framdi Allan Mørkøre sína einastu útskifting undir dystir, tá Høgni Eysturoy loysti Bárð Olsen av miskeiðis í seinna hálvleiki.

*- uni*

14 heimadystir í vodafonedeildini komandi kappingarár. Eitt 6. pláss ella lægri gevur 13 heimadystir í vodafonedeildini í 2011.

### Perlumál

Bert eitt mál kom í dystinum, men sigast má, at tað var eitt perlumál av dimensjónum. Uppleggið til málið átti Hjalgrím Elttør, sum eftir gjøgnumbrot í vinstru legði bóltin

## Bara eitt stig ímóti B36

Um ÍF ikki røkkur einum evropiskum plássi hetta kappingarárið, so verða avrikini hjá ÍF ímóti B36 ein rættiliga stórur partur av orsøkini. Hetta kappingarárið fekk ÍF bert eitt stig og eitt mál ímóti B36. Tá liðini hittust í Gundadali í fimta umfari endaði dysturin við javnleiki 1-1. Hjalgrím Elttør legði B36 á odda í fyrra hálvleiki, og Rógvi Jacobsen javnaði fyri ÍF. Tá liðini hittust í 14. umfari gjørdist talan um sorl. B36 vann heili 5-0 í Fuglafirði. Tann effektivitetin hevði B36 ikki ígjár, tá teir bert skoraðu eitt mál, men tað rakk so aftur til trý stig ímóti ÍF.

*- heri*